us?

Hebrearabrævinum sigur um, *at Gud við endan á hesum døgum hevur talað til okkara við Syninum, sum Hann hevur sett til arvinga alra luta, og sum Hann eisini hevur skapt heimin við. Hann er ljómi dýrdar Hansara og ímynd veru Hansara, og Hann ber alt við orði máttar Síns.*

Hesa løtuna, kánanitar njóta nýskapta vínið, hoyrist einki kjak um aldurin á víninum. Nei, bert fullkomin njótan. Toastmastarin staðfestir óvitandi, at tað óvanliga er hent, at brúðgómurin hevur goymt tað besta vínið til seinast.

Hetta fyrsta tekin Jesusar lýsir ómetaliga væl, hvør Jesus veruliga er. Hann, hin ævigi "upphav skapnings Guds". Hann sum tíð og stað eru undirløgd. Hann er komin til okkara, sum sjálvi heilt og fult eru undirløgd tíð og stað *Sum grasið eru dagar mansins; sum blóman á markini, so blómar hann. Táið vindurin blæsur á hann, er hann ikki til longur, og stað hansara veit einki um hann longur.*

Megna vit at góðtaka fyrsta tekin Jesusar, megna vit eisini at fata øll hini undrini evangeliini umtala, *tí Gudi er alt møguligt.* Og sum vit hyggja eftir verkunum Jesus fremur, so eru tey so heilt og fullkomiliga burturvið allari mannavón og viti.

Hvør annar hevur nakrantíð gjørt tað, sum hann gjørdi? Hvør hevur við einklum orðum nakrantíð gjørt vatn til vín? Mettað fimmtúsund menniskju við fimm breyðum og tveimum fiskum? Gingið á aldunum? Hótt vind og sjógv so tey tagdu? Fríað besett? Grøtt menniskju fyri alskyns veikleikar, deyv, blind, lamin, blóðsjúk, spitølsk? Og omaná alt hetta. Hvør hevur nakrantíð reist deyð menniskju upp aftur til lívs?

Tríggjar ferðir lesa vit, at Jesus reisti deyð menniskju upp aftur til lívs. Tólv ára gamla einkadóttir sýnagogustjórans var júst deyð, tá Jesus og pápi gentuna komu inn í heimið. Eftir at Jesus hevði rikið øll á dyr uttan foreldrini, tók Jesus í hondina á gentuni, rópti á hana og bað hana reisa seg upp. *Tá kom andi hennara aftur, og hon reistist upp alt fyri eitt; og Hann beyð, at tey skuldu geva henni at eta.*

Ein dagin Jesus er á ferð, møtir hann einum gravarfylgi. Ein einkja hevur mist einkarson sín, og Jesus ger ikki mætari enn, at hann steðgar berarunum, troystar mammuna og biður hana ikki gráta. *Og Hann segði: „Ungi maður, Eg sigi tær: Reis teg!" Tá reisti hin deyði seg og fór at tala, og Hann gav móður hansara hann. Tá fall ótti á øll, og tey prísaðu Gudi og søgdu: „Stórur profetur er risin upp millum okkara!" og: „Gud hevur vitjað fólk Sítt!"*

Eina aðru ferð komu boð eftir Jesusi. Vinur hansara Lazarus er sjúkur, álvarsama sjúkur, men hóast boðini, drálar Jesus. Og tá hann kemur fram, er støðan versnað so mikið, at maðurin er bæði deyður og jarðaður. Støðan er vónleys, men tað var hon eisini í hinum báðu fyrru førunum. Um líkið liggur í songin, i kistuni ella í grøvuni er eitt feitt fyri okkum vanligu menniskju. Deyðin stigbendist ikki. MEN Jesus, sonur Guds, Gud opinberaður í holdi - hann ivast ikki. Hann kunngerð fyri systir tí deyða *„Eg eri uppreisnin og lívið, tann, ið trýr á Meg, skal liva, um hann so doyr. Og hvør tann, ið livir og trýr á Meg, skal í allar ævir ikki doyggja"* og so spyr hann í sama andarhaldi *"Trýrt tú hesum?"* Eina løtu seinni rópar hann inn í gravarhellið *„Lazarus, kom út!" Tá kom hin deyði út, bundin við líkverju um føtur og hendur; og turriklæði var bundið um andlit hansara. Jesus segði við teir: „Loysið hann og latið hann fara!"*

Nú vit við Bíbliuni sum grundarlag kunnu staðfesta, at barnið í krubbuni er *Kristus komin eftir holdinum, Hann, sum er Gud yvir øllum, signaður í allar ævir,* koma vit til spurningin ikki slepst undan: Hví kom hann? Hví gjørdist Gud hold?

Hvør okkara lastar myndlistamannin, tá hann vrakar høvuðsverk sítt, um hann sjálvur metir, tað miseydnað? Hvussu ber tað so til, at Gud gjørdi tað spilta høvuðsverkið, menniskja, krúnuna á skaparaverkinum, til sítt "lívsverk" heldur enn at ripa tað í bálið? Svarið finst í undrunum yvir øllum undrum: "Tí so elskaði Gud heimin, at Hann gav Son Sín, hin einborna, fyri at hvør tann, ið trýr á Hann, skal ikki fortapast, men hava ævigt lív."

Gleðilig jól.



# Gleðiboðskapurin

*gleðiboðskapurin nú ljóðar*
*innar í einsemisvrá*
*teim gloymdu fegin bjóðar*
*av lívsins keldu drekka svá*

*í margar búnar vit hann lata*
*sum nú hóvar okkum best*
*sær og sínum sæta*
*marglæti í hjarta fest*

*blániðan fjalir himnaboga*
*ógongd tykist leið at gá*
*brátt vit síggja brandin loga*
*kærleiksglæmuna at sjá*

*myrkt og trongt nú innanhalla*
*gott at hava sálarfrið*
*fuglameingi ei kann spjalla*
*skjótt at missa mál og mið*

*friðarhøvdingin friðsælu fremur*
*í kærleikans geislandi skrúð*
*lítillátin við rættvísi kemur*
*til teirra í vesælu búð*

*ljómandi fagnarboð ljóðar*
*innar í myrkastu vrá*
*teim neyðstøddu, gloymdu bjóðar*
*við lið sína høgru at stá*

*sorgtung spor og byrðan nívur*
*men Himnadrottur leiðir teg*
*í takkarsong tú trívur*
*ljómandi á lívsins veg*

*á himnahválvi gyltur ljómi*
*einglar syngja hátt í høll*
*dýrdarsæluna brátt hómi*
*samansjóðað verða øll*

*einglaljómur fyllir hjørtu*
*gleðiboð um fjøll og dal*
*sjá nú jólastjørnu bjørtu*
*vísur veg til himnasal*

**Sólmundur Joensen**
**des. 2004**